Til

Mentanarnevnd Føroya Løgtings

Tórshavn 31. mars 2023

Takk fyri høvi at leggja okkara sjónarmið fram. Ein viðmerking hjá felagnum var, at ein skúlabókavørður er væl skikkaður at røkja eitt fólkabókasavn, ið eg skipað saman við skúlabókasavninum. Hetta eigur bókasavnslógin at taka hædd fyri.

Ein skúlabókavørður er ein royndur lærari við royndum at arbeiða á skúlabókasavninum, sum eisini er víðari útbúgvin sum skúlabókavørður. Í flestu førum hevur skúlabókavørðurin eisini linjulestur í føroyskum og øðrum máli, hetta ger viðkomandi málsliga væl fyri og gevur breiðan kunnleika til skaldskap.

Seinasta skúlabókavarðaútbúgving varð liðug á sumri í 2003. Innihaldi í útbúgvingini var m.a. kunnleiki um føroyskar og danskar barna og ungdómsbøkur, bókmentasøga, at leita kritiskt á netinum, nakað um bókasavnskunnleika og ein størri uppgáva, sum tey lesandi valdu eftir áhuga og tørvinum á skúlabókasavninum, ið tey starvaðust á.

Ætlanini er av nýggjum at útbúgva skúlabókavørðir, fyri at nøkta tørvin. Útbúgvingin er ikki hillavøra, men vit hava førleikar at seta útbúgvingina saman í Føroyum. Ætlanin er at útbúgvingin skal svara til 60 ECTS. Innihaldi er í pørtum: Námsfrøðilig vitan og gransking, at gera vísindaligar kanningar av praksis, barna- og ungdómsbókmentir, lesivanar o.a., bókasavnsfakligur kunnleiki, at leita eftir vitan og at miðla vitan og ein spurnastýrd uppgáva, sum tekur støðið í arbeiðinum hjá skúlabókavørðinum.

Fólkaskúlalógin er ein serlóg:

Vit vilja eisini vísa á, at skúlabókasavnið hevur sína heimild í fólkaskúlalógini §23. Fólkaskúlalógin er ein serlóg, og ásetingarnar um skúlabókasavnið í fólkaskúlalógini eru settar omanfyri Bókasavnslógina. Hetta atlit eigur Bókasavnslógin at taka hædd fyri.

Skúlaleiðarin varðar av skúlanum og skúlabókasavninum:

Um fólkabókasavnið skal skipast saman við skúlabókasavninum, so má takast hædd fyri, at sambært fólkaskúlalógini § 55. hevur skúlaleiðarin fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av skúlanum og ábyrgdina av virksemi skúlans mótvegis skúlamyndugleikunum á staðnum. Fólkaskúlalógin § 63. ásetur, at nýtsla av skúlans hølum til annað endamál enn skúlans undirvísing eigur bert at vera í tann mun, tað er í sambæri við skúlans tørv. Sambært reglugerðini fyri fólkaskúlaleiðarar § 10. hevur skúlans leiðsla ábyrgdina av søvnum í skúlanum, herundir eisini skúlabókasavninum.

Vinaliga

Vegna Føroya Lærarafelag

Jacob E. Ols.

Jacob Eli S. Olsen